VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

Møtt: Rósa Samuelsen, Jógvan S. Hansen, Egil Petersen, Marin Bláberg, Dánjal Thomsen, Jonhard Joensen, Dánial Johansen, Albert Ellefsen og Jóhannis Joensen.
Ikki møtt: Marjus Dam og Johannes Ellefsen.
Skrivari: Georg Hansen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Eykaætlan 2_EXTRA14_2 | 2 |
| 2 | Fíggjarætlan fyri 2015 | 4 |
| 3 | Umsókn um stuðul - Frælsi | 4 |
| 4 | Umsókn frá SÍF, MBF og Dráttui um frítøku av hallargjaldi | 5 |
| 5 | Uppskot um pædagogiska ráðgeving | 6 |
| 6 | Virðisgrundarlag fyri Vága kommunu | 6 |
| 7 | Skúlastýrið, val av nýggjum limi | 7 |
| 8 | Val av Tilbúgvingarnevnd fyri Vága kommunu | 7 |
| 9 | Byggiloyvi til innilokan av "palli" á matr. nr. 289a í Sandavági, Olevina W. Thomassen | 8 |
| 10 | Matr. nr. 208f í Miðvági, Hjalmar Reynstind | 10 |
| 11 | Uppskot um at Vága kommuna skipar seg sum eitt býráð | 11 |

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-11-6**

## 1. Eykaætlan 2_EXTRA14_2

### Málsfrágreiðing

**<u>Viðmerkingar til eykaætlan 2 2014</u>**

§1. Kommunal fyrisiting:
RS:114 Kommunufyrisiting. Meiravseting til lønir kr. 125.000,- "Námsfrøðilig ráðgeving"

**<u>§2. Almanna- og heilsumál:</u>**

RS:220. Eldrarøkt. Meiravseting til búpláss og umlæting kr. 250.000,-
RS:222. Heimið á Sýnuni. Avseting til bygginevnd v.m. kr. 30.000,-

**<u>§3. Børn og ung.</u>**

RS:31210. Smílikullan: Meiravseting til lønir kr. 25.000,-
RS:31210. Smílikullan: Leiðarin biður um at fáa flutt kr. 20.000,- av konto 1469 til konto 1652. Peningurin skal brúkast til at keypa eitt uttandura klatristativ til Smílikulluna.

RS:31010. Miðgarður: Meiravseting til lønir kr. 200.000,-
RS:31050. Sóljugarður: Minni avseting til lønir kr. 400.000,-

**<u>§4. Undirvísing.</u>**

RS:410 Skúlin á Giljanesi:
Meiravseting til viðlíkahald á konto 1651, kr. 200.000,-.
Minniavseting til inntøkur á konto 2170, kr. 100.000,-: Ítróttarfeløgini vera frítikin fyri at gjalda hallarleigu.

RS:412 Skúlabarnaflutningur: Meiravseting kr. 50.000,- í samband við fótbóltskúlan.

RS:41004 Nýggi skúlin á Giljanesi: Sølan av barakkum er inntøkuførd, írestandi upphæddin er kr. 30.000,-

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**§4 Mentan og frítíð**

\-
RS:514. Jóla- og nýttárshald: Meiravseting á konto 1469 kr. 50.000,-
RS:53200. Ítróttur: Meiravseting uppá kr. 100.000,-
Peningurin skal brúkast til ikki peningagevandi tiltøk á Vestanstevnu og annars til útreiðslur, sum fyri stóran part stava frá Vestanstevnuhaldinum.

**§6. Teknisk mál rakstur.**

\-
RS:616. Hegn og bøgarðar: Meiravseting kr. 100.000,-
RS:62010. Kirkjugarðar: Meiravseting kr. 25.000,-
RS:631. Rakstrargøgn: Minniavseting kr. 100.000,-

**Teknisk mál løga.**

\-
RS:61810. Byggibúning: Játtan flutt til RS:632. Keyp av bilum, minniavseting kr. 200.000,-
RS:61800. Søla av grundstykkjum. Staðfestar inntøkur uppá kr. 200.000,-

RS:632. Keyp av bilum: Samtykt at keypa bilar til umsitingina og teknisku deild. Tveir bilar eru keyptir fyri netto kr. 255.504,-. Ætlanin er at keypa ein bil afturat fyri kr. 105.000,-. Brúk er fyri tilsamans kr. 360.000,- Av hesum vóru kr. 300.000,- játtaðar við fyrstu viðgerð.

**Tilmæli, 17. september 2014, pkt. 1:**
Umsitingin mælir til at eykaætlanin verður samtykt.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 1:**
Viðmælt.

**Avgerð**
Samtykt.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-11-5**

## 2. Fíggjarætlan fyri 2015

### Málsfrágreiðing
Samb. ásetingum um fíggjarætlanir hjá kommununum v.m., skal fíggjarætlanin hava fyrstu viðgerð innan. 1. oktober.
Eldraøkið verður yvirtikið 1. januar 2015, og enn vita vit ikki við vissu, hvussu hettar kemur at ávirka fíggjarætlanina fyri 2015. Nevndin fyri heimið á Sýnuni skal gera eina fíggjarætlan, og fyrr enn hon er gjørd, vita vit ikki, hvussu nógv skal setast av. Við yvirtøkuni fylgja eisini inntøkur. Hesi tølini hava vit enn ikki fingið frá TAKS, so fyribils mugu vit staðfesta, at tað ikki ber til at gera eina neyva fíggjarætlan fyri eldraøkið. Skúlin á Giljanesi, Miðgarður, Sóljugarður og Smílikullan hava gjørt uppskot til fíggjarætlan. Hesar eru óbroyttar lagdar inn í samlaðu ætlaðina fyri 2015. Fyrsta uppskot av fíggjarætlanini er ein framflyting av tølunum fyri 2014, við teimum broytingum, vit kenna.

**Tilmæli 17. september 2014, pkt. 2:**
Umsitingin mælir til at samtykkja fíggjarætlanina.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 2:**
Viðmælt

### Avgerð
Samtykt.

**2014-24-28**

## 3. Umsókn um stuðul - Frælsi

### Málsfrágreiðing
Ítróttarfelagið Frælsi søkir um fíggjarligan stuðul. Roknskapurin fyri 2013 javnvigar við kr. 15.563,-.
Fíggjarætlanin fyri 2014 javnvigar við kr. 48.000,-

**<u>Áður samtykt í hesum máli:</u>**
Á fundi tann. 16. august 2014 mælir Mentunar- og Trivnaðarnevndin til at veita ein stuðul uppá kr. 10.000,-

VÁGA KOMMUNA

Tel.  +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Tilmæli 17. september 2014, pkt. 10:**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og Trivnaðarnevndini.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 10:**
Viðmælt.

### Avgerð
Samtykt.

**2014-24-32**

## 4. Umsókn frá SÍF, MBF og Dráttui um frítøku av hallargjaldi

### Málsfrágreiðing
Umsókn frá, SÌF, MBF og Drátti um at sleppa undan at rinda fyri hallarleigu.
Umsitingin hevur kannað, hvønn politikk aðrar kommunur føra á økinum.

**Áður samtykt í hesum máli:**
Á fundi tann. 16. august 2014 mælir Mentunar- og Trivnaðarnevndin til at ganga umbønini á møti, og at arbeiði verður sett í verk at endurskoða stuðulin, sum veittur verður til ítrótt.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 12:**
Viðmælt.

### Avgerð
Samtykt.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-40-92**

## 5. Uppskot um pædagogiska ráðgeving

### Málsfrágreiðing
Frágreiðing um, hvussu langt málið við pædagogiskari ráðgeving er komið.

**Áður samtykt í hesum máli:**

Á fundi tann 16. august 2014 mælir Mentunar- og Trivnaðarnevndin til at arbeiða víðari við málinum. Mælt verður til, at størvini verða lýst leys.

**Tilmæli. 17. september 2014, pkt. 13:**
Taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og Trivnaðarnevndini. Mælt verður eisini til, at størvini vera normerað til 60 tímar.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 13:**
Viðmælt.

### Avgerð
Samtykt.

**2014-04-15**

## 6. Virðisgrundarlag fyri Vága kommunu

### Málsfrágreiðing
Virðisgrundarlag fyri Vága kommunu.

**Áður samtykt í hesum máli:**
Á fundi tann. 16. august 2014 mælir Mentunar- og Trivnaðarnevndin til at viðmæla uppskot til virðisgrundarlag fyri kommununa.

**Tilmæli 17. september 2014, pkt. 14:**
Taka undir við tilmælinum hjá Mentunar- og Trivnaðarnevndini.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 14:**
Viðmælt.

### Avgerð
Samtykt.

**2014-21-28**

## 7. Skúlastýrið, val av nýggjum limi

### Málsfrágreiðing
Albert Ellefsen ynskir, at ein nýggjur limur verður valdur í skúlastýrið í hansara stað.

### Avgerð
Samtykt at Dánial Thomsen, sum nú er varalimur, verður fastur limur og at Albert Ellefsen verður varalimur.

**2014-47-26**

## 8. Val av Tilbúgvingarnevnd fyri Vága kommunu

### Málsfrágreiðing
Sambært §12, stk. 2 í løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012, skal kommunan seta eina Tilbúgvingarnevnd til fyrisiting av kommunalu tilbúgvingini.
Sambært §12, stk. 4 í somu lóg, skulu hesi veljast í Tilbúgvingarnevndina: Borgarstjórin, sum er formaður, tilbúgvingarleiðarin, eitt umboð fyri Føroya Landfúta og ein meiriluti, tilnevndur av kommunustýrinum.

### Avgerð
Samtykt at velja Rósu Samuelsen, borgarstjóra, Marin Bláberg og Johannes Ellefsen. Eisini eru Dagfinn Petersen tilbúgvingarleiðari og John Martin Olsen sum umboð fyri Føroya Landfúta í nevndini.
Varalimir: Dánial Johansen, Dánial Thomsen og Jógvan S. Hansen.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-42-42**

## 9. Byggiloyvi til innilokan av "palli" á matr. nr. 289a í Sandavági, Olevina W. Thomassen

### Málsfrágreiðing

Olevina W. Thomassen søkir um byggiloyvi til innilokan av "palli" á matr. nr. 289a í Sandavági (á Sondum 31).

Grundøkið er 174 m2 og húsini eru uml. 65 m2. Nettonýtingarstigið er 0,37.

Húsini standa sera tætt í hesum økinum og næsti grannin móti útbyggingini (matr. nr 280c) er einans 4 m frá, har frástøðan er longst, og góðar 2 m frá, har frástøðan er stytst.
Tveir útbygningar eru á hesi síðu av bygninginum. Ein durur, sum sæst á niðanfyristandandi korti, og enn ein úbygningur við líknandi støðd á sunnara enda av húsunum. Ímillum hesar báðar útbygningar er betonrepos og úthurð til húsini. Eisini eru tvey vindeygu í útvegginum, sum ætlast at byggja út.

Fyri brunatrygdina eigur loyvi einans at vera givið , um talan verður um brunatryggan vegg/múr. T.e. beton múr. Heldur ikki eigur vindeyga- ella hurðaop at vera í einum tílíkum.

Umsitingin mælir frá at geva loyvi til útbyggingina grundað á omanfyristandandi frágreiðing.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |




**Áður samtykt í hesum máli:**
Tekniska nevnd samtykti á fundi 15. august 2014 at málið skuldi kannast nærri.

**Tilmæli 12. september 2014, pkt. 32:**
Umsitingin mælir Teknisku Nevnd til ikki at ganga umsóknini á møti.

**Tekniska nevnd, 12. september 2014, pkt. 32:**

Mælt verður frá at geva byggiloyvi sambært umsókn.

**Avgerð**
Málið verður kannað nærri.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-42-29**

## 10. Matr. nr. 208f í Miðvági, Hjalmar Reynstind

### Málsfrágreiðing

Eigari av matr. nr. 208f í Miðvági (Nýggivegur 40) hevur grivið út til sethús, sum hann tann 13. juni 2014 hevur fingið byggiloyvi til.

Í útstykkingini er mest loyvda hædd á planering og mønu á húsunum ásett. Hetta er er týðiliga viðmerkt í ognarbrævinum hjá eigaranum.

Í sambandi við útgrevsturin er eigarin komin niður á hellu og hann hevur nú planerað nakað hægri enn tað, sum er ásett. Við hesi planeringshædd og teimum húsum, hann setir á stykki, fer mønin á húsunum 69 cm uppum tað ásetta.

Notat um avleiðingar av hesum umframt hvussu húsini koma at standa í mun til verandi, er hjálagt hesum máli.

**Áður samtykt/tilmæli:**
12. september 2014 mælir Tekniska Nevnd til at halda fast við ásettu kotuna sambært ognarbrævinum og at beina málið í Kommunustýrið.

**Tilmæli: 17. september 2014, pkt. 4:**
Mælt verður til, at sokkulin verður lækkaður, og at kommunan ger semju um møguligar eykaútreiðslur.

**Fíggjarnevnd, 17. september 2014, pkt. 4:**
Viðmælt.

### Avgerð

Samtykt at geva frávik frá planeringshæddini og at sokkulin verður lækkaður.

Tel.  +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Kommunustýrið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar 10 | Almennur fundur |
| Fundardagur | 24. september 2014 kl. 18:00 |
| Fundarstaður | Miðvágs Skúli |

**2014-02-4**

## 11. Uppskot um at Vága kommuna skipar seg sum eitt býráð

### Málsfrágreiðing

Í §4 stk. 1 í Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum stendur m.a.: "Kommunustýri verður nevnt bygda(r)ráð, tó kunna kommunustýri í kommunum við 1500 íbúgvum ella fleiri nevna seg býráð."
Borgarstjórin mælir til, at Vága kommunustýri samtykkir at broyta heiti frá at eita bygdaráð til býráð.

### Avgerð

Samtykkt.

### Bók lisin Fundur lokin

Rósa Samuelsen
Dánial Johansen
Jóhannes Ellefsen
Jógvan Sjúrður Hansen
Jonhard Joensen
Jóhannis Joensen
Marjus Dam
Egil Petersen
Marin S. Bláberg
Dánjal Thomsen
Albert Ellefsen